**GÁVUGÓÐS. Hósdagin sær ein nýggj mentunarlig sømdargáva dagsins ljós. Hon er úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum.**

# Garðyrkismaðurin og mentanin



*Ungdómsmynd av Torvaldi Poulsen, garðyrkismanni*

MENTAN

*Birgir Kruse*

Hósdagurin er føðingardagurin hjá havnamanninum og garðyrkismanninum Torvaldi Poulsen, sála. Tá hann andaðist tríggjar dagar eftir 87 ára føðingardagin í 1999, varð síðsti vilji hansara at stuðla mentanini, sigur bróðursonurin, Regin av Steinum.

Tað verður nú gjørt við Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum.

– Endamálið er at stuðla uppundir útbúgving hjá ungum fólki, sum hava listarligar gávur, sigur Malan Marnersdóttir, sum er formaður í nevndini.

– Hetta er ein privatur grunnur og ein trímannanevnd ger av, hvør fær stuðul, ella sømdargávu. Úr orðabókini havi eg tó heldur valt at nýta orðið »gávugóðs« í hesum sambandi. Tað merkir nakað, sum verður givið einum. sum ein gáva. Og tað er tað, tað er, sigur Malan. Men eftir reglugerðini kann eisini søkjast um stuðul úr grunninum.

– Tá gáva verður latin, er tað altíð á føðingardegi Torvalds, sigur Malan Marnersdóttir. Og føðingardagurin er hósdagin. Tá verður kunngjørt hvør tað verður, sum á fyrsta sinni fær gávugóðs úr hesum nýggja grunni.

Sosialurin skilir, at nevndin hevur funnið verdugan móttakara, ið lýkur treytirnar. Somuleiðis er greitt, at gávugóðsið úr nýggja mentunargrunninum er munadyggari enn M.A. Jacobsen virðislønin. Tó skilst, at talan er ikki um so nógvan pening, sum tá Mentanarvirðisløn Landsins verður latin.

## Garðyrkismaðurin

Torvald Poulsen var útbúgvin garðyrkismaður. Hann var ættaður av Velbastað, men longu á ungum árum var hann hjá Gazet í Kirkjubø og eisini á gartnaríi í Danmark.

Áhuga fyri mentan og tí sum fyrifórst í samfelagnum hevði hann sum fáur, sigur bróðursonurin Regin av Steinum. – Hartil var hann Kaggamaður, sigur Regin.

Í áhugaverdu bókini hjá Sonna Smith, sum lýsir søgu Kaggans frá 1969 til 1999, er fleiri forvitnisligar myndir av Torvaldi. Millum annað saman við Tommy Arge myndlistamanni. Henda myndin er tikin á ársveitslu í Kagganum í 1978, sama árið sum Tommy Arge doyr. Um júst teir báðar, Torvald og Tommy, sigur formaðurin í LISA, at gleðina at skapa høvdu teir í felag, hvør á sín hátt .

Í síðsta filmi Andrej Tarkovskijs »Offurið« í 1986 er hugvekjandi frásøgn um garðyrki og at gróðurseta. Sjálvt í betong og steingrund. Verður rætt atborið, so veksur og sprettir sum frá líður. Hiðani ynskja vit góða eydnu við nýggja gróðursetta grunninum.



*– Síðsta ynski Torvalds var at stuðla mentanini, sigur Regin av Steinum lærari á Argjum*

## Mentan og stuðul

Í bløðunum hevur Mentamálastýrið lýst við stuðulsmøguleikum, bæði til eftirútbúgving av myndlistafólki, altskyns mentunartiltøk og til at gera loftmiðlatilfar.

Um ársskiftið upplivdu vit fyri fyrstu ferð, at ein fyritøka boðsendi Føroya Symfoniorkesturi at spæla fyri teimum og teirra. Fyritøkan keypti stutt og greitt eina nýggjárskonsert fyri 30.000 krónur.

Beinanvegin bílegði ein kappingarneyti hjá somu fyritøku eina konsert næsta ár. Henda fyritøkan legði 10.000 krónur omaná. Av sonnum má sigast, at tekin eru til, at tað grør um gangandi fót á føroyska mentunarøkinum.

Hóast langt er á mál, skulu vit á samanbera okkum við londini kring okkum á hesum øki, so kann í ein ávísan mun sigast, at tann sannroynd, at mentan kostar, hevur vunnið frama.

At arbeiða við mentan er einki bíligari enn at arbeiða við eitt nú skipasmíði. Og hví skuldi tað tað. Í báðum førum vænta vit eitt gott avrik. Og hjá listafólkinum er breyði eins dýrt og hjá verkamanninum.

## Tríggjar kvinnur

– Torvald hevur sjálvur valt, hvussu nevndin skal setast saman, sigur Jórun í Dali, formaður í Listasambandi Føroya. Henda nevndin tekur so avgerð um, hvør skal fáa sømdargávu, ella stuðul úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum, sum fulla heiti á grunninum er.

– Eg haldi tað vera eitt stórt stig tann rætta vegin, sigur Jórun, at LISA nú umframt at velja umboð í almennar grunnar, eisini eigur umboð í privatum grunni sum hesum.

Umframt formannin í Listasambandi Føroya eru nevndarlimirnir rektarin á Fróðskaparsetri Føroya og formaðurin í Føroya Lærarafelag, sum er triði nevndarlimurin. Hesi trý eru øll føddir limir. Tað vil siga, at tey umboða teir stovnar og feløg, sum nevnd eru. Formaður er altíð rektarin á Fróðskaparsetrinum. Tað var eisini ynski Torvalds.

Í løtuni eru tað sostatt tríggjar kvinnur, ið manna nevndina. Tær eru Malan Marnersdóttir formaður og tær báðar Jórun í Dali og Elsa Birgitta Pállsdóttir Petersen.



*– Gleðina at skapa høvdu teir í felag, sigur formaðurin í LISA Jórun í Dali um teir báðar Torvald Poulsen og Tommy Arge, sum her síggjast á ársveitslu í Kagganum 1978*



*Svend Poulsen vanliga nevndur Bambus og Torvald Poulsen í góðum lag*





*Malan Marnersdóttir rektari á Fróðskaparsetri Føroya og formaður í Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum*



*– Eg haldi tað vera eitt stórt stig tann rætta vegin, sigur Jórun í Dali, formaður í Listasambandi Føroya, at LISA nú umframt at velja umboð í almennar grunnar, eisini eigur umboð í privatum grunni sum hesum*



*Elsa Birgitta Pállsdóttir Petersen, nevndarlimur*




*– Torvald var Kaggamaður, sigur Regin av Steinum. Søguna um henda felagskap kunnu vit lesa um í bókini hjá Sonna Smith, sum lýsir søguna hjá Kagganum, árini 1969-1999*

